Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Dennis Holm, løgtingsmaður

Svarari: Eirikur í Jákupsstovu, landsstýrismaður í tilfeingis- og vinnumálum

Evni: Bólkur 5 í fiskidagaskipanini

Spurningar:

1. Hvussu gongur við arbeiðinum at útinna samtyktina í løgtingsmáli 28/2025?
2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvørjum ætlanum arbeitt verður við í hesum sambandi?

Viðmerkingar:
Ein samanrenning millum viðrák í náttúruni, eitt politisk val um at fylgja tilmælinum frá Havstovuni við fokus á burðardyggan fiskiskap og góðar fiskaprísir hevur ført við sær, at tað seinastu mánaðirnar hevur verið nógv virksemi í heimaflotanum, eisini hjá útróðrarbátunum í bólki 5 í fiskidagaskipanini.

Góða gongdin heldur áfram í januar, og hava bátar í bólki 5 í tonsum fiskað 35% meiri í januar í ár enn í 2025, og avreiðingarvirðið er góð 57% hægri í januar í ár, samanborið við januar í 2025.

Góða gongdin í 2025 førdi við sær, at fiskidagarnir hjá bólki 5B vóru uppi um hálvan oktober í fjør. Hetta førdi eisini við sær, at Løgtingið 18. november samtykti uppskot til samtyktar um fiskidagar hjá bólki 5.

Løgtingið samtykti eisini at heita á landsstýrismannin um at javnseta bólk 5A og bólk 5B við hinar bólkarnar í fiskidagaskipanini, um at taka upp spurningin um smáar avreiðingar skulu telja við sum fiskidagar – og um at gera eina serskipan fyri opnar føroyskar bátar, sum er uttanfyri fiskidagaskipanina.

Nú farið er um hálvan februar er áhugavert at vita, hvussu líður við arbeiðinum.

Á Løgtingi, 17. februar 2025

Dennis Holm